# TILTØK

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mánakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønarmøti, kl. 20.30 Útimøti um viðrar.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Oddur á Lakjuni talar. Evnið: Rættvísi og fyrigeving.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vitnið, Hvalba**
Á møtinum onskvøldið kl. 20 talar Don Hinchliff.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Frá 8. august-26. august er Tilhaldið opið kl. 15.00-17.00***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Felagið Tórshavn skipar fyri gongutúri mikudagin 10. august kl. 18.00. Gingið verður til Brynjumannaborð-Stórareyn og Skælings bygd, farið verður av Kunningarstovuni í Havn. Tilmelding neyðug.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
**er í summarfrí frá 1. juli til 5. september 2005.** Tá verður spælistovan í Margarinfabrikkini.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00
Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Kvinnufundur kl. 20–21.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

STARVSLÝSING

## Deildarleiðari til bygningadeildina

**Við hesum verður søkt eftir arkitekti til bygningadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast. Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávan er at leiða og standa fyri bygningadeildini.

Høvuðsuppgávurnar hjá bygningadeildini fevna um nýbygging og viðlíkahald av almennum bygningum. Harumframt tekur deildin lut í viðgerð av øðrum málum, har bygging og bygningar, landslag og formlist eru partar av hesum. 4 fólk starvast á bygningadeildini.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir arkitekti, helst við royndum innan leiðslu. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir, er førur fyri at eggja og ganga undan, og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjamálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:

Landsverk
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. september 2005. Merkið brævbjálvan "Deildarleiðari til bygningadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Oyvind Brimnes, stjóra, á tel. 31 13 33 ella á lv@lv.fo.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*



## Starvsfólk til avgreiðsluna

Søkt verður eftir starvsfólki til avgreiðsluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum

Arbeiði fevnir m.a. um:
- help-desk tænastur
- upplýsing um ferðslu
- leiðbeining í sambandi við netbókingar
- bílegging av ferðaseðlum og pakkatúrum

Krøv
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin
- hevur kunnleika til bókingarskipanir og ferðaseðlasølu.
- dugir at arbeiða við teldu
- hevur evni at samarbeiða og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- kann arbeiða undir trýsti

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. august 2005. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Heidi Askham á tlf. 34 10 10 ella e-mail: heidia@atlantic.fo.

Umsókn skal sendast til Atlantic Airways, Vága floghavn, 380 Sørvágur.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

www.flyfaroe.com